

## Vinnuháskúlin søkir *húsavørð*
## at byrja 1. januar 2008.

**Um starvið**

Sum húsavørður á Vinnuháskúlanum hevur tú ábyrgd av øllum vanligum húsavarðararbeiði í bygningum skúlans. Starvið er eitt fulltíðarstarv.

**Førleikakrøv**

Umsøkjarin skal hava maskinmeistara-útbúgving.

**Lønar- og setanarviðurskifti**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og fíggjarmálaráðið.

**Umsókn skal sendast til:**

Vinnuháskúlan
Att. Hans Johannes á Brúgv, stjóri
Postboks 104
FO-110 Tórshavn.

**Freistin**

Umsóknarfreistin er týsdagin 27. november 2007.

Nærri fæst at vita við at ringja á tel 350 250, ella tel 212549.

Vinnuháskúlin hevur fýra útbúgvingar: Skipara, skipsførara, maskinist og maskinmeistara. Skúlin lýkur STCW krøv, og tí eru útbúgvingarnar á altjóða støði og geva arbeiðspláss kring allan heim. Á starvsstovunum finst øll standard nútímans útgerð. Í dag ganga 160 næmingar á skúlanum.

KREA

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251 · vh@vh.fo · www.vh.fo



## Útbering av dagbløðum og reklamum



**LEYST STARV**

Vit søkja eftir fólki at bera bløð út í

**Lamba**

Ert tú 13 ár ella eldri, og hevur hetta tín áhuga, so ring á **tel 35 14 05** frá kl. 10 - 17 ella send ein teldupost:
**utbering@prent.fo**

## Prentmiðstøðin

Smyrilsvegur 13 · Postboks 3314 · 110 Tórshavn
tel 34 14 00 · Útbering tel 35 14 05 · Fax 35 14 01
utbering@prent.fo · www.prent.fo





**Almenn ráðstevna í Norðurlandahúsinum leygardagin 10. nov.**

## Føroyar mest dragandi oyggjaland á jørð

**Hetta siga 522 altjóða serfrøðingar. Tað setur krøv. Hvat gera vit við tað?**

Heimsins størsta tíðarrit, National Geographic, bað 522 ferðaserfrøðingar meta um 111 oyggjalond. Teir góvu Føroyum fremsta pláss! Dentur varð lagdur á burðardygd, umhvørvisligar og vistfrøðiligar dygdir, sosialan og mentanarligan samleika, varðveitslu av søguligum bygningum og fornminnum, dygdina á ferðavinnuleiðsluni í landinum, vakurleika og framtíðarútlit. Føroyar fingu flest stig og endaðu sum einasta land í næstovasta bólki, (eingin kom í ovasta), sum eitt upprunaligt, óspilt land, sum sannlíkt verður verandi so. Men er hetta nú so?

SamVit skipar nú fyri ráðstevnu um vistferðavinnu, sum júst varpar ljós á, hvussu vit varðveita og menna tær umhvørvisligu og mentanarligu dygdir, sum gjørdu Føroyar til nummar eitt í kanningini. Ráðstevnan viðger evnið: Hvussu menna og marknaðarføra vit Føroyar sum vistferðavinnuland?

**Fyrilestrahaldarar**

**Dr. John S. Hull**, ein av National Geographic-serfrøðingunum, sum var við í kanningini (sí www.intervale.ca). **Carol Patterson**, altjóða serfrøðingur í marknaðarføring av vistferðavinnu (sí www.kalahari-online.com). Umhvørvisserfrøðingar í Føroyum greiða frá núverandi støðu. Veitarar í Føroyum greiða frá sínum royndum. Avvarandi landsstýrismenn hugleiða um Føroyar sum vistferðavinnuland í framtíðini.

**Leygardagin, 10. nov. 2007 frá kl. 10-17**
**í Norðurlandahúsinum. Matur fæst eisini.**

**Prísur:** Luttøkan er ókeypis.

**Tekning:** Tekna teg á samvit@samvit.fo ella ring til SamVit á tlf. 306900.

**Skrá:** Sí www.tourist.fo.

SamVit
Faroe Islands Enterprise

REPROZ